## Rokningin kom 41 ár ov seint

Sigrid Pedersen, sum býr í Steigen í Norðurnoregi, fekk ein hvøkk nú um dagarnar, tá postmaðurin kom við einum brævi til mann hennara. Í brævinum var ein rokning frá kommununi fyri rusksavning, men trupulleinin er, at maður Sigrid Pedersen doyði fyri 41 árum síðani. Við blaðið Nordland sigur hon, at øll árini hevur hon fingið rokning frá kommununi í sínum navni, og tí skilir hon ikki, hvussu kommunan nú brádliga brúkar navnið hjá manninum so mong ár aftan á deyða hansara. Blaðið skrivar ikki, hvat kommunan sigur.



## Brek við útróðrarbátum

Ein kanning hjá norsku sjóferðslumyndugleikunum nú um dagarnar avdúkaði ymisk brek við fleiri útreóðrarbátum. Av teimum 21 bátunum, sum blivu kannaðir, høvdu fýra so álvarssom brek, at teir vórðu hildnir aftur, og umborð á hinum skipunum staðfesti eftirlitið 19 brek, sum skulu fáast í rættlag. Átakið hjá sjóferðslumyndugleikunum umfatar í fyrsta lagi bátar upp til 15 metrar, og kanningarnar halda fram í tríggjar mánaðir afturat, skrivar NTB.

# Listaskattur fyri 47 milliónir skrásettur

**Nú fyrsta fullfíggjaða skrásetingin av listaverkum hjá Listasavninum er gjørd, varða savnið av verkum fyri 47 milliónir krónir**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Um ikki so langa tíð fáa fólk høvi at síggja stóra listaskattin hjá Listasavninum á internetinum*

Listasavn Føroya hevur á øðrum sinni kannað øll listaverk, sum savnið eigur ella hevur í varðveitslu, útlánt listaverk íroknað. Harumframt eru øll grafisk prent og tekningar skrásett fyri fyrstu ferð, og tí er hetta fyrsta fullfíggjaða skrásetingin, sum gjørd er á savninum.

Sambært viðtøkum og mannagongdum Listasavns Føroya er tað álagt stovninum at skráseta øll listaverk, ið savnið varðar av, og at kanna tey regluliga. Skrásetingin skal vera so nágreinilig sum gjørligt, tí hon er neyðug til frama fyri varðveitslu, gransking og miðling av listaverkunum. Bara almennir stovnar kunnu lána listaverk frá savninum, ið ásetir treytir fyri láni.

### Villur rættaðar

Nú ið skrásetingin er endurskoðað, og øll grafisk prent, tekningar og nýkeypt listaverk eru tald uppí, varðar savnið av 2048 listaverkum, júst 1000 listaverk fleiri enn frammanundan. Listasavn Føroya lænir í løtuni 585 listaverk út til almennar stovnar. Tryggingarvirðið á øllum listaverkunum er á leið kr. 47 milliónir. Konservatorur kannar regluliga standin á listaverkunum. Standurin er lýstur í skrásetingini. Fleiri horvin listaverk eru funnin, og talið á horvnum listaverkum er nú niðri á 52.

Í endurskoðaðu skrásetingini eru nógvar villur rættaðar, sum eyðvitað eru komnar fyri í tí drúgva arbeiði, tað er at skráseta so mong listaverk. Eisini eru nýggjar upplýsingar fingnar til vega um mong listaverk. Villurnar og nýggju upplýsingarnar snúgva seg um m.a. myndaheiti, støðd, tøkni, staðseting, dagfesting og signaturar. Skrásetingin er vorðin nágreiniligari, tí at allar áskriftir framman og aftan á listaverkunum eru skrásettar. Út frá áskriftunum ber til at vita nógv áhugavert um einstøk listaverk, m.a. hvat tey upprunaliga kostaðu, hvar tey eru sýnd fram, og hvørjar viðmerkingar listafólk hava til listaverkini ella umstøðurnar rundan um tey.

### Út á netið

Fotomyndirnar av einstøku listaverkunum vóru sum heild vánaligar, men nú eru fleiri hundrað listaverk avmyndað av serkønum fotografum. Tær fotomyndirnar kunnu brúkast bæði til skrásetingina og møguligar endurgávur. Arbeitt verður við at fáa so nógv listaverk sum gjørligt avmyndað av serkønum fotografum.

Listasavn Føroya arbeiðir eisini við einari skráseting av listaverkum á øðrum hondum. Har eru higartil 487 listaverk skrásett hjá fýra listafólkum: Beintu av Reyni, Fridu Zachariassen, Inga Joensen og Ruth Smith.

Sambært viðtøkunum skal partur av skrásetingini verður tøkur á netinum fyri almenninginum. Hesum verður arbeitt við í løtuni.

## Altjóða summarskeið á Fróðskaparsetrinum í 2009

TÍÐINDASKRIV

### Útlendingar vilja lesa føroyskt

Fróðskaparsetrið fær nógvar fyrispurningar úr øðrum londum frá studentum, sum vilja læra seg føroyskt og læra um Føroyar og føroyska mentan. Ígjøgnum tíðina hava einstaklingar uttaneftir verið gestalesandi á Føroyamálsdeildini, fyri ein stóran part sjálvlesandi og hava fingið einstaklingsleiðbeining og undirvísing frá lærarum á deildini.

**Skeið fyri norðurlendingar**
Tá ið talan er um norðurlendskar studentar, hevur deildin tó leingi havt eina fasta skipan. Frá o.u. 1970 hevur Føroyamálsdeildin havt summarskeið fyri norðurlendskar studentar, tey fyrstu mongu árini 4. hvørt ár; nú er skeið tvey ár á rað, so verður eitt ár umlopið, og síðan aftur skeið 2 ár á rað.

**Altjóðaskeið í føroyskum frá 2004**
Fyri fimm árum síðan varð fyrsta altjóðaskeiðið í føroyskum á Føroyamálsdeildini. Lýst varð á Alnetinum við skeiði í føroyskum máli og mentan fyri universitetsstudentar og kunning send til universtetsdeildir fyri norðurlendsk mál, germonsk mál og almenn málvísindi. Skeiðið varð hildið í juli mánaði við 29 studentum úr USA (7), Sveis (4), Kanada, Japan, Eysturríki, Italia, Avstralia, Onglandi, Týsklandi, Hollandi og Belgia umframt útlendingum búsitandi í Føroyum.

Í 2005 varð aftur hildið skeið fyri einum fjølmentum og fjølbroyttum flokki og somuleiðis í 2007.

**Altjóðaskeið 2009**
Komandi ár verður altjóðaskeiðið í tíðarskeiðinum 1. – 22. august. Freistin at søkja er 1. apríl 2009. Upplýsingar og umsóknarblað fáast á www.setur.fo > Summer Institute. Skeiðið kostar 6000 kr. Harumframt kemur kostnaðurin fyri ferðina, innivist, mat og lummapengar. Luttakararnir fíggja sjálvir skeiðið, summi fáa studning frá sínum heimauniversitetum, og onkur fær ferðarstuðul frá Fróðskaparsetrinum

**Skeiðsinnihald**
Undirvísing er hvønn gerandisdag, og vikuskiftini verða tikin uppí til útferðir, túrar, og til at vitja søvn. Endað verður við veitslu. Umframt ta dagligu undirvísingina í føroyskum máli halda serfeøðingar fyrilestrar um serlig evni: náttúru, søgu og samfelag, bókmentir, kvæði og dans, grindadráp o.a.

**Menning av undirvísingartilfari**
Bæði tað norðurlendska skeiðið og altjóðaskeiðið hava havt við sær, at nýtt undirvísingartilfar er vorðið til, sum hevur avloyst bókina hjá Lockwood frá 1955. Tað eru mállærarar og studentar á skeiðunum, sum eisini eru málfrøðingar, ið lagt hava úr hondum.

Jógvan í Lon Jacobsen, Zakaris S. Hansen og Hjalmar P. Petersen, skrivaðu Faroese. An Overview and Reference Grammar (2004) saman við Höskuldi Þráinssyni.

Komandi ár kemur út Faroese Grammar for Foreigners við tilhoyrandi lesibók og fløgu við upplestri og úttaluleiðbeining eftir Hjalmar P. Petersen og Jonathan Adams.

Í gerð er eisini byrjanarbók í føroyskum fyri japanar. Hana skrivar Aki Arakawa, sum var á skeiðinum í fjør og júst hevur verið í Føroyum eina tíð og arbeitt við bókini.

**Menning av av vinalagi, kunnleika og samstarvi**
Onkrir av summarstudentunum halda fram við sjálvsnámi og gransking av føroyskum evnum á sínum heimauniversitetum, eftir at teir hava verið á skeiði ella halda á annan hátt fram við at hava tilknýti til Føroya arbeiðsliga ella persónliga. Tey eru, ið vitja aftur.

Tað ber til at lesa meira um altjóðasummarskeiðið á www.setur.fo > Summer Institute

## Nordost út at ferðast

Í næstum fer nógv rósti leikurin »Nordost« út at ferðast kring landið. Fyrsta sýningin í hesum umfari verður longu sunnudagin klokkan 16 á Reinsarínum í Havn.
Síðani verður framsýningarskráin hendan:



20. januar kl. 19.30 á Virkinum á Sandi
21. januar kl 19.30 í Bygdarhúsinum í Miðvági
22. januar kl. 19.30 í Eydnini á Oyrabakka
27. januar kl. 19.30 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
28. januar kl. 19.30 í Atlantis í Klaksvík
29. januar kl. 19.30 í Stóra Pakkhúsi í Vági
30. januar kl. 19.00 á Seglhúsloftinum á Tvøroyri

Eisini verða fleir skúlasýningar kring landið, sum verða lýstar seinni.